almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



*Stjórnardeildin søkir*

# LØGFRØÐING ELLA ANNAN SAMFELAGSFRØÐING

**Talan er um eitt avloysarastarv fram til 1. februar 2009, við møguleika fyri føstum starvi.**

Vit sóknast eftir einum fólki, ið hevur løgfrøðiliga, samfelagsfrøðiliga, ella aðra hóskandi universitetsútbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum.

Fulltrúin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at viðkomandi er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Arbeiðsuppgávunar hjá fulltrúanum fevna um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk, ummælan av uppskotum til lógir og kunngerðir, málsviðgerð í ávísum málum, tilevnan av leiðbeiningum og kunningartilfari, luttøku í tvørfakligum samstarvi og aðrar uppgávur á deildini.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.
Fleiri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 25. januar 2008.

Send umsóknina til Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Á Stjórnardeildini eru 6 starvsfólk og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnarskrivstovuni fevnir um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum, gerð av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum, skrivstova hjá Pensjónsfundinum, ið tekur avgerðir um fyritíðarpensjón o.a.

KREA




Tórshavnar kommuna sóknast eftir einum leiðara til byggimál.

### Arbeiðsøkið

- Byggimál, -loyvi, -eftirlit o.a.
- At leiða og samskipa arbeiðið á deildini
- Fyrireika mál, sum skulu fyri nevnd, og sum hoyra undir økini nevnd omanfyri, og gera uppskot til tilmæli
- At øll mál á deildini fáa neyðuga og rætta viðgerð, og at tey verða avgreidd til ásettu tíð
- Brunateknisk byggimálsviðgerð

### Útbúgving

Byggifrøðingur ella aðra relevanta útbúgving. Førleika til EDV (Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook).

Koyrikort krevst til starvið.

### Royndir

Royndir innan umsiting og byggimálsviðger. Duga væl føroyskt, bæði í skrift og talu.

### Annað

Hevur tagnarskyldu viðvíkjandi viðurskiftum, sum kunnleiki fæst til gjøgnum starvið.

### Persónligir eginleikar

Skal m.a.:

- arbeiða sjálvstøðugt og duga væl at fyristita
- vera positivur, fyrikomandi og duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- kunna virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur sum arbeiða hjá kommununi
- vera trúgvur móti tiknum avgerðum
- hava virðing og fatan fyri politisku skipanini

### Setunarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast til ber og verður lønt eftir tænastumanna-stiganum, 35. stig ella sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

### Meira fæst at vita

um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, býararkitekt, telefon 30 20 10.

### Umsókn

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. januar 2008. Merkið umsóknina leiðari á byggi- og býarskipanardeildini.

**Tórshavnar kommuna**